**Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Smærugøta 9A,**
**FR-100 Tórshavn.Tlf.316973. Fax 318516. fsn@fsn.fo www.fsn.fo**

**Tórshavn tann 2023 03 14**

# Lesarabræv

***Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin***

**Áheitan frá Føroya Skipara-& Navigatørfelag til polittiska mynduleikan.**

**Set í gildið somu løgtingslóg sum bleiv sett í gildið tann 15. apríl 2016. við smávegis broytingum.**

*Løgtingslóg nr 30 2016. Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskap eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum.*
Og tað er serligani §7. stk 2 sum er so ljóandi:

*Gjaldið fyri kvotur keyptar á uppboðssølu, kann ikki dragast frá søluvirðinum av veiðuni, tá hýrur verða gjørdar upp og goldnar manningini.*

**Hetta kundi verði soljóðandi:** Øll almen ásett veiðu avgjøld og *gjaldið fyri kvotur keyptar á uppboðssølu, kunnu ikki dragast frá søluvirðinum av veiðuni, tá hýrur verða gjørdar upp og goldnar manningini.*

Tann 13. septembur 2022 bleiv dómur feldur í Eystara Landsrætti, har Fiskimálaráðið fekk viðhald í at Fiskimálaráðið hevði loyvi at seta lóg í gildi sum nevnt omanfyri.

Nú fyriliggur eitt ítøkuligt uppskot til hoyringar:

***Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)***
*(dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)*

Føroya Skipara-& Navigatørfelag hevur fingið ætlaða uppskotið til hoyringar og hetta fer FSN at gerða viðmerkingar til
.
Sum talvan vísir, so er talan um stórar broytingar í veiðugjøldum, har verðandi gjøld hækka munandi, og nýggj gjøld koma inn, so sum fyri Lodnu, heystgýtandi Sild og heimaflotan.

Tað er eingin loyna, at hesi gjøld koma at hava stóra ávirkan á lønirnar hjá okkara fiskimonnum, tí hesin parturin við veiðuavgjøldum liggur sum nú er inni í sáttmálanum sum ein loyvdur frádráttur.
Hetta er upprunaliga ein gomul áseting frá 80 inum tá skip fiskaðu rækjur í Canada, og manglaðu nøkur tons í last so bleiv ein semja gjørd um at keypa írestandi kvotur í felag.

Men sannroynd er at henda áseting hevur fylgt/forfylgt manningunum til dagin ídag,
Fá høvdu væntað at ein uppboðssøla fór at koma í hesari øldini og eru
viðurskiftini broytt munandi síðan í 80 inum.

Verður støðið tikið í verandi gjøldum á uppsjóvarfiski sæst munurin á verandi og nýggja gjaldinum í talvuni niðanfyri.

| | Miðalprísur- 21/22 (kr./kg.) | veiðigjald (kr./kg.) | nýtt veiðigjald (kr./kg.) |
|---|---|---|---|
| makrelur | 6,63 | 1,23 | 1,46 |
| norðhavssild | 4,96 | 0,89 | 0,89 |
| heystgýtandi sild | 4,96 | 0,00 | 0,89 |
| svartkjaftur | 2,05 | 0,31 | 0,31 |
| lodna | 5,17 | 0,00 | 0,98 |
| botnfiskur | 21,60 | 1,08 | 2,16 |

Um undantøkini fyri heimaflotan verða strikaði so vænta vit at trupuleikin gerst nógv størri enn hann er í dag við at manna heimaflotan, fiskiskaprin hevur ikki verði naka at reypa av, um so prísirnir hava verði nøkulunda til tíðir.

FSN er á tí áskoðan. Skalt tú valda, ja so má tú gjalda

Vinarligast
Annfinnur Garðalíð
Formaður